

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UG 319 KM: 128.000
Árgangur: 15.09.99 Seinast sýnaður: 12.01.05

Útgjald kr. 35.440,- Kr. 88.000,-



TOYOTA COROLLA 2.0 DIESEL

Skrásetingarnr.: HM 041 KM: 215.000
Árgangur: 19.05.99 Seinast sýnaður: 05.08.04

Útgjald kr. 25.040,- Kr. 62.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SOL — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KP 422 KM: 203.000
Árgangur: 13.10.99 Seinast sýnaður: 26.07.05

Útgjald kr. 38.240,- Kr. 95.000,-



HYUNDAI COUPE 2,0

Skrásetingarnr.: JR 700 KM: 58.000
Árgangur: 13.07.00 Seinast sýnaður: 01.02.04

Útgjald kr. 33.110,- Kr. 94.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL D4-D TERRA — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UN 025 KM: 126.000
Árgangur: 28.06.00 Seinast sýnaður: 17.11.05

Útgjald kr. 38.710,- Kr. 110.000,-



MAZDA 323 2,0 D

Skrásetingarnr.: JK 233 KM: 104.000
Árgangur: 03.12.99 Seinast sýnaður: 14.04.05

Útgjald kr. 31.440,- Kr. 78.000,-

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.



TOYOTA COROLLA 1,6 XLI SEDAN

Skrásetingarnr.: UL 597 KM: 63.000
Árgangur: 29.01.97 Seinast sýnaður: 27.08.04

Kr. 56.000,-



FORD FOCUS 1,6 V/MVG

Skrásetingarnr.: FN 646 KM: 47.000
Árgangur: 24.04.01 Seinast sýnaður: 01.06.05

Útgjald kr. 38.710,- Kr. 110.000,-



LEXUS GS 300 AUT. TIP-TRONIC — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SR 600 KM: 93.000
Árgangur: 03.09.01 Seinast sýnaður: 02.05.05
Viðmerkingar: Leðursetur - elinstilling - klimaanlegg - radio/CD til 6 fløgur - fjarstýrt sentrallás - fartpilot - alufelgur - elrútar o.m.a

Kr. 348.000,-



HONDA CIVIC 1,6 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: PA 665 KM: 67.000
Árgangur: 15.04.03 Seinast sýnaður: 15.04.03

Kr. 132.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Vikuskiftið friðarligt hóast nógv var at gera hjá løgregluni

**Vikuskiftið hevur verið friðarligt, sigur løgreglan, men hóast hetta er listin langur yvir hendingar, har løgreglan er boðsend: Rúsdrekkakoyring í Suðuroynni og Vestmanna, motorsúkkla útav og útflýgjan av tablettum er nakað av tí, ið løgreglan hevur at arbeiða við**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vakthavandi á politistøðini sigur seg ikki hava nakað yvir tað vanliga, tá hann skal greiða frá vikuskiftinum, men tó er listin langur. Her er nakað av tí, ið løgeglan hevur at arbeiða við eftir vikuskiftið:

Fríggjakvøldið hendi herverk í Havn og smærri ferðsluóhapp vóru í J. C. Svabosgøtu í Havn, í Runavík, í Vágum og millum Vestmann og Kvívík koyrdi ein 111 km. um tíman og missir koyrikortið við treytaðum dómi.

Við Áir fór ein motorsúkkla útav og maðurin fekk álvarsligan skaða. Hann endaði á Landssjúkrahúsinum og er nú sendur niður til Danmarkar til kanningar í beinum og ryggi, men hann er ikki í lívsvanda. Blóðroynd er tikin av manninum.

Annars eru smálutir á listanum hjá løgregluni, so sum fullir menn, ið gera eitt sindur um seg, prutl til ampa í Sumba og í Guttormsgøtu í Havn kom eldur í eina grytu, men stórvegis meira hendi ikki.

### Leygardagin

Á morgni varð boðað frá minni ferðsluóhapi í Klaksvík og í Havn var sagt frá eitt sindur av fullamannalótum í býnum og ein maður sparkaði ein hýruvogn og varð tikin á støðina.

Ein maður, ið ikki var rúsaður, varð tveittur út av dansistað, tí hann varð mettur at vera ómøguligur. Løgreglan tók mannin og okkurt hevur eftir øllum at døma verið um metingarnar hjá durðavørunum, tí hann er nú ákærdur fyri ólag í almennum reglulag, sum tað eitur.

Leygardagin varð boðað frá gróti á Tjørnuvíkarvegnum og varð hetta burturbeint.

Um dagin komu fólk á politistøðina í Havn við tablettum, sum tey høvdu fingið frá einum útlendingi náttina fyri á einum dansistað í Havn. Løgreglan kannar málið og ávarar ímóti at taka ímóti slíkum, tí ein veit ikki hvat slag slíkt kann vera.

Klokkan 4 sunnunáttina varð ein bilførari tikin við kenning í Vági.

Klokkan 9 sunnumorgun tók løgreglan ein á støðina, ið lá og svav við Vesturkirkjuna í Havn.

Klokkan 15 sunnudagin tók løgreglan ein bilførara við kenning í Vestmanna.

# Bingja funnin á Eystaru bryggju við 16 tonsum av spreingievni

**Arbeiðseftirlitið gjørdi eina óhugnaliga uppdaging á Eystaru bryggju í Havn fríggjadagin, visti ÚF at siga**

SPREINGIEVNI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í eini bingju mitt á havnarlagnum fann eftirlitið 16 tons av spreingievni, sum hevur staðið á havnarlagnum í tveir mánaðir. Hetta er beinleiðis brot á reglunar um innflutning og goymslu av spreingievni, sum siga at spreingievni skulu goymast á góðkendari goymslu langt burtur frá fólki og bygdum øki.

Bingjan við teimum 16 tonsunum av spreingievnum stendur nú á tryggum stað á Glyvursnesi, men sambært stjóran á Arbeiðseftirlitinum kundi hetta fingið álvarsamar avleiðingar. – Um hesi spreingievnini fóru í luftina, so var eingin Havn longur, sigur Karl Joensen.

Sambært reglurnar eigur spreingievnið at verða flutt burtur, so skjótt tað kemur til landið. Og tað eigur síðani at vera goymt á serligari goymslu, sum Arbeiðseftirlitið hevur góðkent. Tað var ein innflytari, sum átti spreingievnið, sum varð flutt til landið við Skipafelagnum. Arbeiðseftirlitið fekk meira ella minni av tilvild eitt tipp um bingjuna við tí vandamikla innihaldinum, og eftirlitsfólk fóru beinanvegis á stgaðið, samstundis sum málið varð lagt fyri politiið, visti Útvarpið at siga fríggjadagin.

# Ferðsluóhapp í Vágum

FERÐSLA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fríggjadagin hendi eitt minni ferðsluóhapp í Vágunum, men stórur persónsskaði stóðst ikki av óhappinum.

Talan var um ein eldri mann, ið varð ákoyrdur av einum persónbili. Lækni og sjúkrabilur komu á staðið, men løgreglan sigur, at talan var um smásnuddir.

Óhappi hendi við Missiónshúsið í Sørvági.